


# Jóansøkudreymur

Orð og lag:
Dagfinn Olsen
juni 1999

*Í fríum høgum lofti, sær fuglur setti kós*
*Í miðum summarløtum, sær sveinur valdi drós*
*Í suðuri búreisingar, reistu smáttu tá*
*Fjálgur logi hitar lon og vrá.*

*Tá morgunroðin litar, í lofti hoyrast ljóð.*
*Í summarløttum løtum, rodna morgunfljóð*
*Ungt lív í føgrum blóma, yvir lág og reyn*
*Sveimar burt í jóansøkudreym.*

*Niðurlag:*
*Setið segl í sunnan - ljóða stevnuboð*
*Gentur, dreingir, repið segl og tog*
*Miða summarkætið heita, kveikir uttan drál*
*Heitan dreym og jóansøkubál*
*- innst í hvørji sál*

*Tvøroyri við longsli, hýsir stevnufólki kær*
*Vágur gestablídni vísir, gestum nær og fjar*
*Jóansøkudreymur ferðast, frítt um bygdagarð*
*Stevnukæti fremst í huga var.*

# Hásummarkvøða

*Nú durva íður - hav við klettin stendur -*
*Í bergsins barni yðjur fuglamongd*
*Í liðum blómur taka saman hendur -*
*Um dimmið - fjøll í reyðargulli fongd*

*Niðurlag:*
*Fjálga, sæla summarløta -*
*Kveikir vónir barmum í*
*Morgun blítt sæst kvøldið møta*
*- eymt um hægstu náttartíð*

*Nei, tað er eingin tíð á hesum landi*
*Sum er so vøkur, dragandi og blíð -*
*Á dreymanátt er knýtt mangt ástarbandið -*
*Í undurføgru jóansøkutíð*

*Nú menskir alvar eins og ungar moyggjar*
*Á firðum fremja mangt eitt ítróttsbragd,*
*Ein dýrgripur - sum prýðir vára oyggjar -*
*Tey eru øll - og okkum mikil frægd*

*Hygg grøs og urtir - sóljufjøld í lágum -*
*Í náttardøgg tey sløkkja tosta sín*
*Fær - finn tær hvíld við keldufar í náðum*
*Og skoða verkið - skrýtt í summarlín*

NePtuN (2001)



























